

Eysturtýsku vaktirnir høvdu standandi boð um at skjóta ein og hvønn, sum royndi at flýggja um múrin

MYND: POLFOTO

annan møguleika. Bert í juli mánaði í 1961 flýddu 30.000 eysturtýskarar vesturum.

– Eysturtýski búskapurin toldi ikki, at vit einki gjørdu við fráflytingina. Múrurin var einasti møguleikin, sum vit høvdu eftir, segði sovjetiski leiðarin.

Og náttina millum 12. og 13. august í 1961 varð Vestur-Berlin stikaður inni handan píkatráð. Ein gyrðing, sum seinni gjørdist til ein 3-4 metra høgan betonmúr, sum strekti seg yvir 150 kilometrar, og har vakttorn, landminur, hundar og løgreglumenn, sum høvdu boð um at skjóta fyrst og spyrja aftaná syrgdu fyri varðhaldinum.

## Spældu við óttan

Og so var múrurin veruleiki. Ein veruleiki, ið tóktist eins fastfrystur sum globala politiska støðan. Og eisini ein veruleiki, sum gjørdist ein beinleiðis fyrimunur hjá nøkrum.

Hóast kalda kríggið var ein ideologiskur dystur millum Sovjet-Russland og USA, so innibar støðugi vandin fyri altoyðandi kríggnum eisini støður, har halin veitraði við hundinum, sum fleiri søgufrøðingar hava tikið til.

Fortreytin fyri hesum var, at Sovjetsamveldið og USA hvør í sínum lagi royndu at vinna sær heimsvaldi. Kommunistarnir høvdu tørv á at prógva sína ideologi, meðan USA í sínum lag hevði lært frá tveimum heimsbardagum, at tað var ikki líkamikið fyri USA, hvussu restin av heiminum sá út.

Og hetta gav leiðarum hjá smærru tjóðum møguleika at trýsta og ræða stórveldini. Tað var sum nóg mikið, um tey sannførandi megnaðu at hótta við at fara hendan ella handan vegin. Tito megnaði hóast kommunismu at halda seg leysan av Sovjetsamveldinum. Mao Zedong og Kina vórðu støðugt mett sum ein latent bumba í kalda krígnum, tí Mao noktaði fyri at hava Russland sum einasta samvinnulandi. Og í Egyptalandi spældi Gamal Abdel Nasser stórveldini somikið væl út móti hvørjum øðrum, at landið fekk ræði á Suez-veitini og fígging til Aswndbyrgingina.

Vietnam og Taiwan vóru enn meira ræðandi dømi um somu snildir, men eisini í Týsklandi dygdi statsleiðarin at gera sær dælt av somu effekt.

Sameinda Týskland hevði verið ein búskaparligur kraftdepil í Europa, og hvørki USA ella Sovjet tordu at hugsa tankan um, at eitt sameint Týskland fór til fíggindan. Og hóast bæði Conrad Adenauer og Walter Ulbricht vóru trýstir av fólkinum, sum ynskti eitt sameint Týskland, so megnaðu teir báðir hvør í sínum lagi at spæla upp á óttan hjá stórveldunum.

Adenauer hevði sjálvur sagt, at eitt tvídeilt Týskland var garanturin fyri stuðuli frá Nato. Og í hansara eygum var hetta týdningarmiklari enn eitt sameint týskland, sum helst hevði kravt neutralitet í mun til Nato ella Warzhawa-paktina. Hann vildi tó ongan tíð avvísa Sovjetsamveldinum í samráðingum eitt sameint Týskland - ein slík noktan hevði heilt víst kostað atkvøður. Men hann syrgdi samstundis fyri, at eingin samráðing var í nær námind nøkrum úrsliti.



20 ár eru liðin síðani Berlin múrurin fall. Myrka linjan á Patzdamerplaz vísur hvar múrin gekk





MYNDIR: INNA TÖRNROOS

At sosialdemokratiski andstøðuleiðarin, Kurt Schumacher, segði seg vera til reiðar at tosa um eitt sameint Týskland og hernaðarligan neutralitet, styrkti eisini støðuna hjá Adenuaer, sum við árunum fekk mest sum ovurstórt vald í Nato. Eitt somikið stórt vald, at Eisenhower í 1959 var sannførdur um, at hóast hann og Krusjtjov kundu funnið semju um Berlin, so vildi hann ikki gera nakað, sum kundi fella Adenauar.

Og Eystaru megin var støðan ikki ólík. Ulbricht mest sum vissaði Sovjetsamveldið um, at uttan stuðul fór Eysturtýskland ikki at standa seg. Ein støða, sum gjørdi, at Ulbricht støðugt megnaði at kroysta bæði hernaðarligan og fíggjarligan stuðul frá Moskva.

Og hann tók eisini fleiri fet víðari. Uttan at spyrja Moskva eftir, mótmælti hann enska/amerikanska/franska politikkinum í Vestur-Berlin. Hann sendi sjálvur eina almenna sendinevnd til Beijing, uttan at russar vistu um hetta, og hann spurdi heldur ongan eftir, tá hann broytti mannagongdirnar fyri atongd frá Vestur- til Eystur-Berlin.

Snøgt sagt, so var óttin hjá stórveldunum fyri, at teirra sameindu kundu fara til fíggindan, ov stórur, til at somu stórveldi tordu at vísa sína megi. Týsku statirnir stýrdu snøgt sagt sjálvir týska politikkinum hjá stórveldunum. Í báðum førum væl stuðlað av múrinum, sum eingin teirra veruliga ynskti – men sum hvørgin kundi vera fyriuttan í taktiska spælinum.